# Oddaliðini skulu hava fulla úrtøku

## 500 atgongumerkir eftir til FCK-Brøndby

ODDADYSTUR
*Páll Holm Johannesen*

Í komandi umfari í bestu donsku kappingini møtast arvafíggindarnir FCK og Brøndby. Fyri fyrstu ferð verður møguleiki fyri, at føroyingar verða at síggja á báðum liðum. Jón Rói hevur verið á vøllinum í báðum dystunum fyri Brøndby, og møguleikarnir hjá Toda Jónsson at koma á lið hjá FCK aftur tykjast størri, tí fleiri leikarar eru skaddir.

Nýklassikarin í donskum fótbólti, sum dystirnar millum FCK og Brøndby verða kallaðir, verður annað vikuskifti. Danmark spælur komandi vikuskiftið EM-undandyst ímóti Rumenia, og tí verða ongir dystir í Superliguni hetta vikuskiftið.

Nú frástøðan millum FCK og Brøndby er tódnað niður í bert fýra stig, hava atgongumerkini gingið sum heitt breyð, og mánadagin boðaði stjórin í FCK, Flemming Østergaard, frá, at tað bert eru 500 atgongumerkir eftir. Tað verða í alt 40000 áskoðarar í Parkini annan sunnudag, og helst verða fleiri føroyskir útisetar millum teir 40000 í Parkini og heppa á sínar landsmenn.

**Oddaliðini STÍF, VÍF og Kyndil møta øll liðum, sum tey skulu vinna á, um liðini ikki skulu missa eitt fet í stríðnum um gullkrónurnar**

MANSHONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Eitt umfar verður í landskappingini hjá monnum í kvøld. Trý av oddaliðunum, STÍF, VÍF og Kyndil eru á heimavølli í kvøld, og felags fyri øll oddaliðini er, at tey møta liðum, tey skulu hava fulla úrtøku ímóti.

Strandingar fáa vitjan av KÍF á Skála. Seinast liðini hittust endaði við javnleiki 27-27. STÍF er framvegis oddalið, og skal frástøðan til vestmenningar og kyndilsmenn varðveitast, er av alstórum týdningi, at dysturin verður vunnin. Strandingar lótu illa at spælinum í fyrra hálvleiki ímóti H71 leygardagin, men betur gekk í seinna hálvleiki, og finna strandingar spælið í seinna hálvleiki ímóti hoyvíkingum framm aftur, so átti teir at megna at knógva kollfirðingum í kvøld.

VÍF fær vitjan av botnliðnum úr Runavík, Tjaldur. Tjaldur endar við vissu á aftasta plássinum í bestu mansdeildini í ár, og tí átti dysturin verið ein avgreiðsluspurningur hjá VÍF. Vestmenningar liggja ájavnt við STÍF í stigatalvuni, men teir hava leikt ein dyst fleiri. Skulu vestmenningar framvegis hótta STÍF er kravið einfalt ein sigur ímóti botnliðnum Tjaldur.

Seinasti dysturin í kvøld verður grannauppgerð í høllini á Hálsí, har Kyndil og H71 bresta saman. Kyndil hevur rættiliga bitið frá sær í endaspælinum, og framvegis hevur havnarliðið møguleika at vinna meistaraheitið. Í Kyndli siga teir seg taka ein dyst í senn, og so fáa teir at síggja, hvussu langt tað røkkur.

Kravið hjá Kyndli í kvøld er ein sigur, um vónin um meistaraheitið skal varðveitast. Hoyvíkingar hava havt fleiri óvæntað úrslit í endaspælinum, men tað tykist sum um luftin er farin úr teimum seinastu vikurnar. Hetta kemur helst av, at felagið úr Hoyvík hvørki er við botnstríðnum ella kann gera seg galdandi í kappingini um heiðursmerkini.


*Framvegis hava kyndilsmenn møguleika at vinna meistaraheitið, men so skulu teir hava hjálp frá øðrum liðum. Í kvøld møta teir H71, og kravið er einfalt ein sigur, um vónirnar um greipuna skulu varðveitast.*

**Dystir í kvøld:**

2603 20.00 VÍF-Tjaldur
2603 20.00 STÍF-KÍF
2603 20.00 Kyndil-H71

**Hondbóltsstøður**
**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 9 | 8 | - | 1 | - | 0 | 547 | 446 | 101 | 26 |
| 2 VÍF | 9 | 6 | - | 2 | - | 1 | 492 | 404 | 88 | 22 |
| 3 StÍF | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 476 | 489 | -13 | 15 |
| 4 Stjørnan | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 453 | 457 | -4 | 13 |
| 5 Kyndil | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 508 | 520 | -12 | 13 |
| 6 Neistin | 9 | 4 | - | 0 | - | 5 | 435 | 464 | -29 | 13 |
| 7 Tjaldur | 9 | 1 | - | 0 | - | 8 | 400 | 531 | -131 | 3 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 9 | 6 | - | 0 | - | 3 | 664 | 562 | 102 | 21 |
| 2 StÍF | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 573 | 498 | 75 | 21 |
| 3 Neistin | 9 | 4 | - | 1 | - | 4 | 598 | 565 | 33 | 18 |
| 4 Kyndil | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 548 | 530 | 18 | 18 |
| 5 KÍF | 9 | 2 | - | 2 | - | 5 | 569 | 595 | -26 | 11 |
| 6 H71 | 9 | 4 | - | 0 | - | 5 | 540 | 617 | -77 | 11 |
| 7 Tjaldur | 8 | 0 | - | 1 | - | 7 | 498 | 623 | -125 | 4 |

**Máltindarnir**
**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 170 | (46) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 159 | (41) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 154 | (42) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 148 | (50) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 138 | (19) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 138 | (42) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 130 | (64) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 122 | (24) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 114 | (9) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 112 | (32) |
| Alina Olaru | StÍF | 101 | (8) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 91 | (8) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 87 | (1) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 82 | (13) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 67 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 183 | (17) |
| Damir Oros | KÍF | 173 | (38) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 142 | (23) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 139 | (5) |
| Áki Olsen | VÍF | 135 | (10) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 127 | (26) |
| Ingi Olsen | VÍF | 119 | (24) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 118 | (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 112 | (26) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 97 | (22) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 96 | (13) |
| John Zachariasen | VÍF | 93 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 89 | (27) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 87 | |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 83 | |



# FM-kapping i Badminton

**FM kapping í badminton fyri børn og ung hevur verið hetta vikuskiftið í Havn.**

**Nr. eitt og tvey í teimum ymsu bólkunum gjørdust**


*U11 Dreingir*
*Nr 1. Fríði Lamhauge, HBF*
*Nr 2: Ari Elingsgaard, ÍF*


*U13 Gentur*
*Nr 1. Brynhild Carlsson, HBF*
*Nr 2: Guðrun Lervig, ÌF*


*U13 Dreingir*
*Nr 1: Reidar Luid, HBF*
*Nr 2: Jan Ellingsgaard, ÌF*


*U15: Gentur*
*Nr 1: Rannvá á Rógvu: VÌF*
*Nr 2: Ulla í Dávastovu, VÍF*


*U15 Dreingir*
*Nr 1: Niklas Højgaard Eysturoy, HBF*
*Nr 2: Hilmars Kass Jacobsen, HBF*


*U18: Gentur*
*Nr 1: Sára Óláóttir Arge, HBF*
*Nr 2: Lis Christoffersen Hansen, VíF*


*U18 Dreingir*
*Nr 1. Rógvi Poulsen, HBF*
*Nr 2: Thomas Hans Rubbeksen, HBF*

**TVÍMANSLEIKIR**


*U15 Gentur:*
*Nr.1 : Rannvá á Rógvu (VíF) / Ulla í Dávastovu (VÍF)*
*Nr.2: Christina Eriksen (VÌF) / Jenny Nielsen (VÌF)*


*U15 Dreingir*
*Nr 1: Niclas Højgaard Eysturoy (HBF) / Hilmar Kass Jacobsen (HBF)*
*Nr 2: Reidar Luid (HBF) / Sigurd Carlsson (HBF)*


*U18 Gentur*
*Nr 1: Lis Christoffersen Hansen (VÌF) / Óluva Bærentsen (ÍF)*
*Nr 2: Sára Óladóttir Arge (HBF) / Anna Katrina Óladóttir Arge (HBF)*


*U18 Dreingir*
*Nr.1: Gunnar Poulsen (HBF) / Thomas Hans Rubbeksen (HBF)*
*Nr 2: Bjarki Chr. Gram (HBF) / Rógvi Poulsen (HBF)*

# Maratonrenning í Føroyum

TÍÐINDASKRIV
*Bragdið*

Frælsa ítróttin her á landi er í støðugari menning, og kappingarnar økjast. Lagt verður fyri við hálvmaratoni á nýggjárinum, og endað verður við Daewoo Marathon Cup um heystið - fýra kappingar, ið tilsamans geva maratonteinin upp á 42,195 km. Flaggskipið er framvegis flaggdagsrenningin í Havn 25. apríl, har luttakaratalið nú er komið upp um tveyhundrað.

Sum nakað nýtt fer felagið Bragdið at skipa fyri heilari maratonrenning í summar. Tiltakið fer eftir ætlan fram leygardagin 19. juli — góða viku fyri ólavsøku. Fyribils er at siga, at hetta er ein roynd at skipa fyri so stórari renning, men eydnast tiltakið væl — áhugin at luttaka og at skipa fyri verður nóg stórur — er ætlanin, at maratonrenningin verður afturvendandi tiltak á hvørjum ári. Rutan er ikki endaliga løgd enn, men kemur at liggja í og uttan fyri høvðusstaðin. Skotið verður upp at byrja í miðbýnum í Havn at renna til Kaldbaks og aftur, síðani runt Havnina og í mál í miðbýnum. Endaliga rutan verður lýst, so skjótt hon kemur upp á pláss.

Annars er at siga, at áhugin fyri maratonrenning millum føroyingar er stórur. Síðsta heyst vóru fleiri niðri í Berlin og runnu, og um fáar vikur fara nakrir til London at taka lut í árligu marathonrenningini har.

Einastu ferð, skipað hevur verið fyri heilari maratonrenning á oyggjaleikum, var í Føroyum í 1989. Runnið var av Selatrað og út á Toftir, og sum mong minnast, kom Absalon Hansen fyrstur á mál og vann gull fyri Føroyar. Aðrir føroyingar, ið luttóku, vóru Hans Birgir Hansen, Harry Hansen, Petur Petersen og Óli Olsen.

Kortini má gerast vart við, at vit tosa um eina sera harða ítróttagrein, ið einans er ætlað teim vaksnu, og sum hava vant miðvíst. Áhugað eiga tí alt fyri eitt at fara til verka, og tey mugu rokna við í minsta lagi trimum venjingardøgum um vikuna. Týdningarmikið er at venja seg at renna langt, men spakuliga, og vanligt er at lata tann eina túrin gerast longri og longri og enda við umleið 30 km tríggjar vikur undan maratonrenningini.

Men vandi er í hvørjari vælferð. Ikki er ráðiligt at økja venjingina ov skjótt. Beinini mugu hava stundir at venja seg við at verða ovbyrjað og mugu koma fyri seg, so hvørt vant verður. Fyri at alt skal vera í lagi, eiga fólk um tey fjøruti og eldri, ið fara at venja á fyrsta sinni, at tosa við lækna fyrst.

Tey, ið ikki hava runnið maraton áður, eiga ikki at hugsa um tíðina — málið má vera at koma á mál. Meira verður at frætta um tiltakið seinni.

Nú vit tosa um frælsa ítrótt kann skoytast uppí, at Frælsur Ítróttur Føroya (FÍF) í næstum fer undir stórt ítróttaátak á Svangaskarði. Tiltakið nevna teir "SKÚLA — FM 2003," og ein snotiligur faldari er gjørdur í hesum sambandi. Teir fara sjálvir at kunna almenningin um átakið, og her skal einans verða lagt afturat, at kappingarnar fara fram leygardagin 17. mai.